# Selja bilin?

– set hann í Sosialin!

Ring og fá ein prís!



Hevur tú ein bil til sølu, so er Sosialurin rætti miðilin at lýsa í.

Tú kanst lýsa við og uttan mynd.

Vit seta lýsingina upp fyri teg ókeypis.

Sosialurin – blaðið øll lesa!

Sosialurin

Postboks 76
FO-110 Tórshavn
post@sosialurin.fo


# TVINGSILS-SØLA

**Týsdagin tann 1. september 2009 kl. 09.15** verður á Dómaraskrivstovuni í rættarsali IV, Undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir ognina matr. nr. 394 b, Sørvágur (Ovari Vegur 11).

Talan er um grundøkið til støddar 150 m² við ástandandi sethúsum við kjallarahædd, miðhædd og lofti. Húsini, sum eru stoypt, eru til støddar uml. 55 m² hvør hæddin.

**Kjallarahædd:**
Gongd, tvey kømur, útbygningur umframt fýrrúm/kjallari.

**Miðhædd:**
Gongd, nýggjur køkur, stova og baðirúm.

**Loft:**
Tætt tróður og gólv lagt á.

Húsini treingja til ábøtur.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Páll Nielsen, advokat, J.H. Schrøtersgøta 20 á tlf. 312171, telefax nr. 315874 ella á teldupostadressuni pall@advokatvirkid.fo ella hjá skrivaranum á teldupostadressuni sigrid@advokatvirkdi.fo

**Advokatvirkið**

Skansavegur 1 · Postsmoga 85
110 Tórshavn · Tlf. 31 21 71

# Skrivstovuhølir til leigu

Ljós og góð skrivstovuhølir á Hjalla 6, til leigu.

**Tel. 21 73 00**

# SUMMARFRÍ

Vit fara í summarfrí tann 13.07.09 og byrja aftur tann 03.08.09. Skrivstovan er stongd í hesum tíðarskeiði.

**Advokatvirkið**

**Páll Nielsen**
**Sigmund Poulsen**
**Eyðhild Skaalum**
**Hans Trygvi Teirin**

Skansavegur 1
Postsmoga 85
110 Tórshavn
Tlf. 31 21 71
fax 31 58 74
pall@advokatvirkid.fo

# Summarfrí

Vegna summarfrí er skrivstovan stongd í tíðarskeiðnum 13. – 31. juli 2009.

Skrivstovan er opin aftur 3. august.

**Løgtingsins umboðsmaður**

Traðagøta 43 · Postsmoga 2008 · 165 Argir

# Journalleiðari

## til Fjarskiftis-, Post-, Elveitingar-, Tryggingar- og Kappingareftirlitið

Søkt verður eftir journalleiðara trý kvarta tíð til Fjarskiftis-, Post-, Elveitingar-, Tryggingar- og Kappingareftirlitið, til setan skjótast gjørligt.

Eftirlitini halda til á Skálatrøð 20 og eru skipað sum stovnar undir Vinnumálaráðnum, við felags stjóra og felags skrivstovuhaldi. 13 fólk starvast á eftirlitunum. Harumframt eru ráðgevar knýttir at stovnunum.

**Arbeiðið**
Arbeitt verður í løtuni við at taka í nýtslu nýggja journalskipan, við heitinum 360°.

Tú kemur at hava ábyrgdina av íverksetanini og framhaldandi umsitingini av hesi skipan, eins og tú kemur at taka lut í øllum vanligum skrivstovuarbeiði á stovnunum.

Starvsfólkini á teimum ymsu eftirlitunum arbeiða í ávísan mun við tvørgangandi uppgávum innan ymsu økini, og kemur tú at starvast saman við dugnaligum starvsfeløgum í einum óformligum starvsfólkaumhvørvi, har avbjóðandi uppgávur verða loystar.

Møguleikar eru fyri at luttaka á viðkomandi skeiðum eins og at taka viðkomandi eftirútbúgving.

**Førleiki**
Umsøkjarar skulu hava skrivstovuútbúgving ella royndir, sum kunnu javnsetast við skrivstovuútbúgving. Umsøkjarar við hesum royndum og kunnleikum hava fyrimun:

- royndir innan journalføring
- royndir innan almenna umsiting,
- góður kunnleiki til edv á brúkarastøði
- góður kunnleiki til føroyska málið

**Setanartreytir**
Setunartreytir og løn eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Setanin fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og hini aðalráðini. Um tú ynskir nærri upplýsingar, er tú vælkomin at seta teg í samband við: Súsannu Leo, ráðgeva, tlf. 356025, teldupost susanna.leo@fse.fo

**Umsókn**
Umsókn saman við prógvum, CV og møguligum viðmælum skal sendast til:

*Fjarskiftiseftirlitið*
*Skálatrøð 20*
*Postboks 73*
*FO-110 Tórshavn*

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 17. august 2009.

FJARSKIFTISEFTIRLITIÐ
TELECOMMUNICATIONS AUTHORITY

*Saknar nakar meg?*

Eg varð funnin mikukvøldið 17/6 í Sigmundargøtu.

Eg var øðiliga svangur.

Kennur tú meg? Ring á tlf. 50 45 33

Vinarliga
Djóraverndarfelagið



Lýsingar er stuðla av Sosialinum

*Spøk, fitt ketta*

Mamma Cats er uml. 1 ár. Hon er spøk og sera góð í sær. Hon er reinlig.

Hevur tú hug at geva Mamma Cats eitt gott heim?

Ring til okkum á tel. 504533

Vinarliga
Djóraverndarfelagið



Lýsingin er stuðlað av Sosialinum

Lesið Sosialin - so eru tit við

# TIL SØLU

**Um hóskandi boð fæst, verður Gávubúðin LI-WI í Streymnesi seld.**

**Tlf 722583 ella 722877**